# Sambandið og Javnaðurin vilja gjarna saman

**Verða tølini, sum veljarakanningin vísir, so er møguleiki fyri at venda aftur til gomlu heimastýrissamgonguna. Og tað vilja bæði Lsbeth L. Petersen og Jóannes Eidesgaard fegin**



VELJARAKANNING

*Ingi Rasmussen og Øssur Winthereig*

Bæði Listbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum, og Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, síggja positivt upp á eina samgongu eftir løgtngsvalið við teimum báðum flokkunum.

Úrslitið í veljarakanningin vísir, at langt hevði ikki verið á mál hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum at skipa eina samgongu einsamallir, men um sjálvstýrisflokkurin kann loysast frá Fólkaflokkinum, so vóru møguleikarnir har.

– Kemur Sjálvstýrisflokkurin inn, so er møguleiki fyri tí gomlu heimastýrissamgonguni. Hon var ikki so galin, og henni hevði eg einki havt ímóti at roynt aftur. Hinvegin mugu vit ongantíð útiloka aðrar, tí tað eru so nógvir møguleikar. Og tað skulu tað eisini vera, sigur Lisbeth L. Petersen.

Jóannes Eidesgaard er ikki eins fegin um úrslitið, men er positivur um eitt samarbeiði við Sambandsflokkin.

– Alternativið er sitandi andstøða. Ein andstøða vil altíð fegin vera alternativ til eina samgongu. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin hava arbeitt væl saman í andstøðu, so eg hevði fegin viljað í eina samgongu við Sambandsflokkin, og hevði Sjálvstýrisflokkurin eisini veirð við, so vóru vit aftur í heimastýrissamgonguni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Lisbeth L. Petersen er sera varin og vil hava allar møguleikar opnar.

– Eg vil ikki avvísa eina breiða samgongu millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin. Tað hevði verið ein stór samgonga við 23 mandatum. Hinvegin er ikki altíð so gott við so nógvum, tí so vóru ov nógv, sum sluppu at ganga fríhjól.

### Tølini mugu ikki gerast ov høg

Sambandsflokkurin hevur í øllum teimum seianstu veljarakanningunum havt høg tøl. Onkuntíð hava tølini verið uppaftur hægri enn hesiferð.

– Hetta sær framvegis gott út. Eg eri altíð nervøs, um tølini vera ov høg, tí vit mugu eisini vera realistisk. Men hetta er virkuliga flott, sigur Lisbeth L. Petersen.

– Vit síggja, at tendensurin stendur við, og tað sær út til, at Sambandsflokkurin fer at vinna valið. Tað merkja vit eisini millum fólk. Men tað er einki óvanligt í politikki, at vit síggja eina kraftiga reaktión ímóti tí, sum er hent politiskt. Men so skal eisini leggjast afturat, at vit hava heimsins bestu stevnuskrá, og tað telur sjálvandi mest.

Sama bjartskygni er ikki at hoyra frá Jóannesi Eidesgaard. Ein flokkur, sum hevur verið í andstøðu siðani mitt í 90-unum, átti kanska automatiskt at staðið til nøkur eykaprosent.

– Toganin millum samband og loysing hevur verið mest markanti spurningurin og tað merkir Javnaðarflokkurin avleiðingarnar av, heldur Jóannes Eidesgaard.

### Fólkaflokkurin hægri enn vanligt

– 21,1 prosent. Tað er í yvirkantinum av tí, sum veljarakanningar vanliga geva Fólkaflokkinum. Í mun til seinasta val standa vit í stað, og tað er gott, tí tað er á valinum, at fólkafloksfólk vanliga vísa okkum álit. Men samstundis haldi eg sjálvur, at ein veljarakanning beint nú, eftir tann turbulensin, vit hava verið ígjøgnum, kann vera merkt av so nógvum. Eg vóni bara, at hetta er ein tendensur, sum heldur, sigur Anfinn Kallsberg, formaður Fólkafloksins.

– Hetta er akkurát sum seinast. Báðir teir smáu flokkarnir eru inni í myndini, og so kanst tú fáa allar kombinatiónsmøguleikar. Tað skal so lítið til. Flytir tú eitt mandat, so er myndin ein onnur. Men tað sær út til eftir hesari veljarakanningini, at teir smáu flokkarnir kunnu gera av, hvør kemur í samgongu, sigur Anfinn Kallsberg.

### Til arbeiðis

Jóannes Eidesgaard heldur seg duga at síggja, at bara eitt ódnartak frá øllum javnaðarfólkið kann hjálpa flokkinum.

– Hvørki ein sterkur Sambandsflokkur ella Tjóðveldisflokkur kunnu loysa sjálvstýrisgongdina. Miðjan má við, heldur Jóannes Eidesgaard.

– Nú er at fara til arbeiðis og fáa ruddað upp í tølunum, sum kanningar seinastu tíðina hava víst, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Innspræning til Tjóðveldisflokkin

**Tjóðveldisflokkurin stendur til at bera alla afturgongd, sum veljarakanningin vísir**

VELJARAKANNING

*Ingi Rasmussen og Øssur Winthereig*

– Hetta er eitt varskó um, at vilja vit halda fram á sjálvstýriskós, so má Tjóðveldisflokkurin koma inn, sum ein sterkur flokkur, heldur Høgni Hoydal.

Í eini roynd at vera bjartskygdur vísir Høgni Hoydal til, at flokkurin seinastu mongu kanningarnar hevur ligið sum størsti flokkur og tað hevur kanska ikki verið besta útgangsstøði.

– Kanska er tað ikki so galið einaferð at liggja aftast í eini veljarakanning, sigur Høgni Hoydal.

### Kostar at taka ábyrgd

– Tann sum stendur fremstur fær flestu skolurnar. So vit mugu bara staðfesta, at tað kostar at taka ábyrgd.

Soleiðis forklárar Høgni Hoydal stóru afturgongdina hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Okkara mál er at savna allar sjálvstýriskreftir. Tað krevur nógv, men vit hava góð fólk, sum nú skulu út í eitt valstríð, sum helst skuldi bøtt um úrslitið hjá Tjóðveldisflokkinum.



# Fólkið heldur hondina yvir Anfinn Kallsberg

**Anfinn Kallsberg er best egnaður sum løgmaður, heldur meira enn triði hvør veljari. Hann tekur tað sum eina álitisváttan frá fólkinum eftir alt tað rumblið, sum hevur verið um hansara persón. Fyri fyrstu ferð ger Lisbeth L. Petersen púra greitt, at hon fer eftir løgmanssessinum eftir valið**



*Hetta er ein fantastisk uppbakking, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, nú triði hvør føroyingur framvegis sigur seg hava álit á honum, hóast hann noyddist at leggja kongin, tí hann fekk ein meiriluta av løgtinginum ímóti sær*

*Mynd: Jan Müller*

LØGMANSEVNI

*Ingi Rasmussen*
*Øssur Winthereig*

Rokið um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg, sum fekk hann at útskriva val í úrtíð, hevur ikki nortið við, at hann er nógv tann best umtókti politikarin í Føroyum.

Tað vísir ein veljarakanning, sum Gallup hevur gjørt saman við Fjølmiðlaráðgevngini fyri Sosialin og Útvarp Føroya.

Heili 36 prosent av teimum 510 veljarunum, sum hava svarað, siga Anfinn Kallsberg vera best egnaðan sum løgmann av teimum seks floksleiðarunum. Hetta er umleið tann sama undirtøkan, sum hann hevur havt áður, um sæð verður burtur frá seinastu kanningini, tá ið heili 48 prosent peikaðu á Anfinn Kallsberg. Síðan tá hava tjóðveldisveljarar í stórum tali vent honum bakið, men stóra undirtøkan í fólkinum er framvegis greið.

– Hetta er ein fantastisk uppbakking. Eg kenni hetta sum eina heilsan frá fólkinum, sum vísir, at tey framvegis hava álit á mær hóast alt tað, sum er hent. Tað er hugaligt at fáa eina slíka álitisváttan. Serliga hugaligt er tað, at so nógvir norðoyingar taka undir við mær, sigur Anfinn Kallsberg, sum kendi seg noyddan at skriva út nýval, tí Tjóðveldisflokkurin ikki longur segði seg hava álit á honum.

Tað hava føroyingar sum heild og serliga fólkafloksveljarar. Heili 84 prosent av fólkafloksveljarum síggja framvegis Anfinn Kallsberg sum besta boð upp á løgmann. Tað talið var 81 prosent í kanning, sum varð gjørd í apríl, men heili 93 prosent í kanningini, sum varð gjørd í oktober.

Serliga noroyðingar sláa manngarð um Anfinn Kallsberg, tí har peikaðu 54 prosent av øllum veljarum á Anfinn sum tann best egnaða løgmann.

### Vil vera løgmaður

Hinir floksleiðararnir fáa langt frá so stóra undirtøku. Stóri vinnarin á valinum sambært kanningini, verður Sambandsflokkurin, sum stendur til at fáa góð 29 prosent av atkvøðunum. Men føroyingar duga ikki at síggja forkvinnuna fyri sær sum løgmann.

Bara 14 prosent av føroyingum halda Lisbeth L. Petersen vera best egnaða sum løgmann. Heldur ikki í Sambandsflokkinum er undirtøkan ovurstór. Har siga 40 prosent Lisbeth L. Petersen vera besta boð, men tað er ein lækking í mun til tær seinastu kanningarnar, tá ið tølini vóru ávikavist 52 og 45 prosent. 21 prosent av sambandsveljarum halda, at Anfinn Kallsberg er besti løgmaður.

– Vit hava ikki profilera meg sum løgmann, og tað er óivað orsøkin til, at eg ikki fái fullan stuðul. Men tað er ikki tað týdningarmesta, hvør er løgmansevni, tí tað sleppur veljarin ikki at gera av. Tað hevur mest týdning, at vit fáa atkvøður, og tað fáa vit, sigur Lisbeth L. Petersen.

Altso er tað ógreiða útmeldingin hjá flokkinum, sum er orsøkin til, at sambandsveljarar og føroyingar ivast í Lisbeth L. Petersen. Men hvør er so støðan til løgmanssessin hjá flokkinum?

– Vit ganga ikki so høgt upp í persónar, og tí hava vit ikki tosað so nógv um, at vit skulu hava løgmann í eini komandi samgongu. Men tað gera vit nú. Vit fara eftir løgmanssessinum, og tað skal vera við mær sum løgmanni, sigur Lisbeth L. Petersen avgjørd.

### Eitt feilskot

Einans 10 prosent av føroyingum halda, at Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, er eitt gott boð upp á løgmann. Soleiðis hevur verið leingi.

Í Tjóðveldisflokkinum halda umleið 36 prosent, at hann er eitt gott boð. Tað er ein lítil hækking. Tað løgna er kortini, at hóast tjóðveldisveljarar hava vent Anfinni Kallsberg bakið, so fara hesir ikki til Høgna Hoydal. 32 prosent siga seg antin »veit ikki« ella »eingin«, tá ið tey vera spurd. Sostatt eru tjóðveldisveljarar ikki serliga sannførdur um, at teirra floksformaður er eitt gott løgmansboð.

– Vit vilja hava, at valið skal snúgva seg um politikk og ikki persónar. Fyri Tjóðveldisflokkin eru tað ikki persónar, sum eru avgerandi. Tað er eitt feilskot, at gera politikk í Føroyum til ein spurning um persónar, sigur Høgni Hoydal.

Hóast tað var Tjóðveldisflokkurin, sum gjørdi av við Anfinn sum løgmann, so fær hann framvegis stuðul frá 27 prosent av tjóðveldisveljarum. Um stóru undirtøkuna, sum Anfinn Kallsberg fær, sigur Høgni Hoydal:

– Vit hava tikið tey neyðugu stigini, so má veljarin taka støðu út frá tí. Tey politisku málini eru avgerandi.

### Ein løgmanseffekt

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, er kanska mest upplagda boðið upp á ein løgmann eftir valið. Men tað halda bara 15 prosent av veljarunum. Hinvegin halda 58 prosent av javnaðarveljarunum nú, at Jóannes Eidesgaard er best egnaði løgmaður.

– Allar kanningar, síðan Anfinn Kallsberg gjørdist løgmaður, hava víst, at sitandi løgmaður fær størstu undirtøkuna. Eg haldi tað vera eitt slag av løgmanseffekt, sum ger seg galdandi. At 58 prosent av javnaðarveljarunum vilja hava meg sum løgmann, er hugaligt. Ein floksformaður skal helst hava, at meiri enn helmingin av hansara veljarum vilja hava hann til løgmann, sigur Jóannes Eidesgaard

## KANNING

Hvønn er best egnaður sum løgmaður?

| | |
|---|---|
| Anfinn Kallsberg | 36 % |
| Lisbeth L. Petersen | 14 % |
| Jóannes Eidesgaard | 15 % |
| Høgni Hoydal | 10 % |
| Kári P. Højgaard | 1 % |
| Jenis av Rana | 1 % |
| Veit ikki | 11 % |
| Eingin | 11 % |

## Fólkaflokkurin letur løgmansboðið liggja

Hóast føroyingar peika á Anfinn Kallsberg sum løgmann, so er lítið sannlíkt, at hann sleppur aftur í løgmansembætið eftir valið, tí hinir flokkarnir siga seg ikki vilja í stjórn við Fólkaflokkin, um Anfinn Kallsberg skal vera løgmaður.

Fólkaflokkurin hevur ikki viðgjørt, hvør skal vera løgmansboð floksins, um Anfinn Kallsberg ikki sleppur.

– Vit hava ongantíð gjørt so nógv hóvasták burturúr viðurskiftum innanfloks. Vit ganga ikki so høgt upp í persónar, og sjálvur havi eg ongantíð roynt at hildið meg framat. Hinvegin havi eg heldur roynt at sloppið undan. Lat okkum nú fáa valið afturum, so fáa vit at síggja, sigur Anfinn Kallsberg.

**-ir**